HAGSTOVA FØROYA

KT-trygd

# KT-trygdarpolitikkur

Útgáva 2.0
10.12.2025

# BROYTINGAR

(broytingar í skjalinum verða skrásettar her)

# INNIHALD


1 Inngangur ..... 3

2 Endamál ..... 3

3 Virkisøki ..... 3

4 Trygdartilvit og ábyrgd ..... 3

4.1 Starvsfólk ..... 3

4.2 Uttanhýsis samstarvsfelagar ..... 4

5 Trygdarásjónarmið og leiðreglur ..... 4

6 Brot á trygdini ..... 4

7 Tilbúgving og rakstrartrygd ..... 4

8 Stýring og eftirlit ..... 5

9 Endurskoðan ..... 5

10 Gildiskoma ..... 5

# 1 INNGANGUR

KT-trygdarpolitikkurin hjá Hagstovu Føroya er eitt yvirskipað skjal, sum lýsir, hvussu stovnurin verjir upplýsingar og KT-skipanir. KT-trygdarpolitikkurin setir karmar fyri, hvussu stovnurin umsitur KT-trygd í samsvari við góðan fyrisitingarsið, lógarkrøv, dátuvernd og aðrar viðkomandi ásetingar.

KT-trygd er ein fortreyt fyri áliti á Hagstovu Føroya sum evsti hagtalsmyndugleikin í landinum. Ognir stovnsins – bæði upplýsingar, KT-skipanir og amboð – skulu verða vard móti óheimilaðari atgongd, missi, broyting og oyðilegging.

# 2 ENDAMÁL

Endamálið við KT-trygdarpolitikkinum er at:

- Tryggja, at upplýsingar hjá Hagstovu Føroya varðveita **trúnað, rættleika og atgeingi**,
- áseta yvirskipaðar leiðreglur fyri verju av upplýsingum og KT-skipanum,
- tryggja, at Hagstova Føroya arbeiðir við eini **váðagrundaðari tilgongd** til KT-trygd,
- stuðla undir ábyrgd, góðum arbeiðsháttum og tryggum atburði hjá starvsfólkum og samstarvsfeløgum.

# 3 VIRKISØKI

KT-trygdarpolitikkurin fevnir um:

- allar upplýsingar, sum Hagstova Føroya eigur ella umsitur,
- allar KT-skipanir, dátugrunnar, net, amboð og útgerð hjá stovninum,
- øll starvsfólk óansæð setanartreytir, t.e. fastsett, tímalønt ella tíðaravmarkað verkætlanarsett starvsfólk,
- uttanhýsis veitarar og samstarvsfelagar, sum hava atgongd til KT-skipanir ella upplýsingar hjá Hagstovu Føroya.

# 4 TRYGDARTILVIT OG ÁBYRGD

## 4.1 STARVSFÓLK

Øll starvsfólk hava ábyrgd av at:

- verja upplýsingar hjá Hagstovu Føroya móti óheimilaðari atgongd og misnýtslu,
- fylgja galdandi leiðreglum og vegleiðingum um KT-trygd,
- boða frá møguligum trygdarhendingum og hóttanum uttan óneyðugt drál.

Hagstovan ger starvsfólk tilvitað um ábyrgdina gjøgnum leiðreglur, kunning og upplæring.

### 4.2 UTTANHÝSIS SAMSTARVSFELAGAR

Samstarvsfelagar og veitarar skulu:

- fylgja teimum trygdarkrøvum, sum Hagstova Føroya setir,
- hava avtalu (t.d. SLA ella dátuviðgerðaravtalu), sum tryggjar nøktandi trygdarstøði,
- tryggja, at egið starvsfólk fylgir krøvum í avtalum um trúnað, dátuvernd og KT-trygd.

## 5 TRYGDARÁSJÓNARMIÐ OG LEIÐREGLUR

Hagstova Føroya leggur dent á:

- **Váðagrundaða tilgongd**: Trygdarráð, regluligar váðametingar og endurskoðanir tryggja, at trygdarstøðið er hóskandi.
- **Atgongdarstýring**: Starvsfólk hava einans atgongd til upplýsingar og skipanir, sum eru neyðugar fyri, at ein kann fremja sítt arbeiði.
- **Dátuvernd og lógargrundarlag**: Allar viðgerðir fylgja dátuverndarlóg og øðrum viðkomandi ásetingum.
- **Fyribyrging og viðgerð av trygdarhendingum**: Tiltøk skulu tryggja, at hóttanir verða staðfestar og viðgjørdar uttan drál.
- **Viðlíkahald av skipanum og skjølum**: Trygdarleiðreglur og tilbúgvingarætlanir verða regluliga dagførdar.
- **Krøv til veitarar**: Veitarar skulu uppfylla trygdarkrøv hjá Hagstovu Føroya.

Hagstova Føroya arbeiðir í samsvari við leiðreglur og góðar siðvenjur innan KT-trygd, herímillum ISO 27001-standardin sum yvirskipaða rammuverkið.

## 6 BROT Á TRYGDINI

Um starvsfólk gerst varugt við møguligt brot ella hóttan, skal hetta **beinanvegin fráboðast** til ábyrgdarhavandi KT-trygdarfólk ella leiðslu.

Brot á leiðreglur kunnu vikna um KT-trygdini og føra til revsitiltøk sambært galdandi reglum.

## 7 TILBÚGVING OG RAKSTRARTRYGD

Hagstova Føroya hevur:

- tilbúgvingarætlan,
- mannagongdir fyri handfaring av óvæntaðum hendingum,

- tiltøk fyri at tryggja framhaldandi rakstur og at upplýsingar og skipanir kunnu endurskapast.

Tilbúgvingarætlan verður royndarkoyrd regluliga fyri at tryggja, at stovnurin kann virka trygt, eisini undir óvanligum umstøðum.

# 8 STÝRING OG EFTIRLIT

- Stjórin hevur yvirskipaðu ábyrgdina av KT-trygdini.
- KT-trygdarráðið fevnir um stjóran, KT-leiðaran og starvsfólk á KT-deildini, sum er serfrøðingur innan KT-trygd og sum hevur dagligu innanhýsis umsitingina av KT-trygd undir hond. Ráðið samstarvar um stýring, eftirlit og menning av trygdararbeiðinum.
- Hagstovan hevur harumframt eitt uttanhýsis dátuverndarfólk (DPO), ið er serfrøðingur í spurningum um vernd av persónsupplýsingum og ráðgevur stovninum á hesum øki.
- KT-trygdarpolitikkurin er alment tøkur.

# 9 ENDURSKOÐAN

KT-trygdarpolitikkurin verður:

- endurskoðaður í minsta lagi **eina ferð um árið**,
- dagførdur, tá broytingar í lóggávu, tøkni ella váðastøðu krevja tað,
- góðkendur av stjóra og KT-trygdarráðið stovnsins.

# 10 GILDISKOMA

KT-trygdarpolitikkurin kemur í gildi, tá hann er góðkendur av stjóra og KT-trygdarráði á Hagstovu Føroya og almannakunngjørdur á hagstova.fo.

**Dato**: 10. desember 2025

**Góðkent av:** Gilli Wardum, stjóri

**Undirskrift:**



HAGSTOVA FØROYA
KVÍGGJARTÚN 1 • POSTRÚM 2068 • FO-165 ARGIR